## Renault og Ferrari eru í serflokki

Áðrenn formil 1 árið byrjaði varð spátt, at McLaren Mercedes og Honda vóru millum bestu liðini í hesum kappingarárinum, so jaligar vóru forsøgnirnar, at heimsmeistarin Fernando Alonso avgjørdi, at skriva undir sáttmála við McLaren Mercedes frá 2007.

Nú ein triðingur av formil 1 koyringunum eru koyrdar, hevur Renault vunnið 4 koyringar og Ferrari hevur vunnið 2, og í løtuni tykist tað sera lítið sannlíkt, at Honda ella McLaren fara at vinna nakra koyring í ár.

Fernando Alonso liggur nú á odda í HM kappingini 15 stig framman fyri Michael Schumacher, og hóast Kimi Räikkönen er á triðja plássi, so hevur hann einans helvtina av stigunum hjá Fernando Alonso.

**nud**

**Støðan í HM fyri formil 1 lið**

| | |
|---|---|
| 1 Renault | 78 |
| 2 Ferrari | 59 |
| 3 McLaren-Mercedes | 42 |
| 4 Honda | 24 |
| 5 Sauber BMW | 12 |
| 6 Williams-Cosworth | 10 |
| 7 Toyota | 7 |
| 8 Red Bull Racing Ferrari | 2 |

# Fernando Alonso vann keðiliga formil 1 koyring

**Spanska formil 1 koyringin endaði við eini spanskari veitslu, og eingin ivi er um, at allir lokalu fjeppararnir vóru ovfarakátir, tá teirra hetja vann. Men fyri tey óheftu var koyringin beinleiðis møðsom**

**FORMIL 1**
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*



*Fernando Alonso tykist hava beina kós móti næsta HM-heitinum á rað*

*Mynd: Scanpix*

Ungi spanski heimsmeistarin í formil 1 Fenando Alonso vann sannførandi á heimabreytini í Barcelona í dag. Alonso í Renault var fremstur frá byrjanini, til hann koyrdi um málstrikuna 18,5 sekund framman fyri Michael Schumacher í Ferrari.

Koyringin gjørdist annars óvanliga keðilig við fáum nærdystum og ongari yvirháling á breytini, um vit ikki telja sjálva byrjanina við. Einastu veruligu roynd at yvirhála átti Ralf Schumacher, ið royndi at sleppa framvið liðfelaganum Jarno Trulli, men Trulli vísti ikki nógvan góðvilja yvir fyri liðfelaganum og lat hurðina aftur so ógvusliga, at Ralf Schumacher misti framvongina og eini 10 pláss, í síðsta enda var bilurin so illa skaddur, at hann noyddist at gevast nøkur umfør seinni.

Juan Pablo Montoya hevði eitt ringt vikuskiftið og byrjaði av 11. plássi. Á 18. umfari snaraði hann runt á breytini, og endaði við at hanga fastur á kantinum millum breytina og skervgrøvina. Hetta var ein vandamikil støða, serliga tá bilurin skuldu takast burtur aftur. Undir vanligum umstøðum hevði trygdarbilurin komið á breytina. Men hesuferð vóru menn sendir út við kranabili fyri at taka bilin burtur, meðan ferðslan drønaði framvið fáar metrar frá teimum.

Hetta var ein óvanlig avgerð, tí seinastu koyringarnar hevur trygdarbilurin verið á breytini ofta í líknandi støðum og støðum, ið hava tykst minnið vandamiklar. Men tað slepst ikki uttanum, at Fernando Alonso júst hevði verið í pittinum, og varð trygdarbilurin settur á breytina, kundi hetta havt kostað honum sigurin á heimabreytini. So avgerðin um at sett trygdarbilin á breytini, hevði verið ein djørv avgerð í formil 1 svaka Spania.

**Úrslitið av sponsku formil 1 koyringini**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Fernando Alonso Renault | 10 stig |
| 2 | Michael Schumacher Ferrari | 8 stig |
| 3 | Giancarlo Fisichella Renault | 6 stig |
| 4 | Felipe Massa Ferrari | 5 stig |
| 5 | Kimi Räikkönen McLaren-Mercedes | 4 stig |
| 6 | Jenson Button Honda | 3 stig |
| 7 | Rubens Barrichello Honda | 2 stig |
| 8 | Nick Heidfeld Sauber-BMW | 1 stig |
| 9 | Mark Webber Williams-Cosworth | |
| 10 | Jarno Trulli Toyota | |
| 11 | Nico Rosberg Williams-Cosworth | |
| 12 | Jacques Villeneuve Sauber-BMW | |
| 13 | Christian Klien RBR-Ferrari | |
| 14 | David Coulthard RBR-Ferrari | |
| 15 | Vitantonio Liuzzi STR-Cosworth | |
| 16 | Tiago Monteiro MF1-Toyota | |
| 17 | Takuma Sato Super Aguri-Honda | |

- Frank Montagney Super Aguri-Honda
- Christijan Albers MF1-Toyota
- Scott Speed STR-Cosworth
- Ralf Schumacher Toyota
- Juan Pablo Montoya McLaren-Mercedes

Støðan í HM fyri formil 1 koyrarar

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Fernando Alonso, Spania | 54 |
| 2 | Michael Schumacher, Týskland | 39 |
| 3 | Kimi Räikkönen, Finnland | 27 |
| 4 | Giancarlo Fisichella, Italia | 24 |
| 5 | Felipe Massa, Brasilia | 20 |
| 6 | Jenson Button, Ongland | 16 |
| 7 | Juan Pablo Montoya, Kolumbia | 15 |
| 8 | Rubens Barrichello, Brasilia | 8 |
| 9 | Ralf Schumacher, Týskland | 7 |
| 10 | Mark Webber, Avstralia | 6 |
| - | Jaques Villeneuve, Kanada | 6 |
| - | Nick Heidfeld, Týskland | 6 |
| 13 | Nico Rosberg, Týskland | 4 |
| 14 | Christian Klien, Eysturríki | 1 |
| - | David Coulthard, Skotland | 1 |

# Julian fekk bæði í posa og sekk



*FM einstaklingar amboð 065 Julian Steingrund er vælnøgdur við vikuskiftið. –Hann fylti runt og bleiv harafturat føroyameistari í amboðsfimleiki*

**Kappingin hjá fimleikarunum hevur verið hørð og strævin. – Men tað loysir seg at venja nógv, heldur 10 ára gamli Julian Steingrund, sum bæði fekk í posa og sekk í vikuskiftinum.**

**FIMLEIKUR**
*Lív Reinert Kjeld*
*liv.reinert.kjeld@sosialurin.fo*

Julian ger fimleik við fimleikafelagnum Støkk av Glyvrum. Tað dámar honum sera væl. So væl, at hann venur fleiri ferðir um vikuna, og tað gevur úrslit.

Í vikuskiftinum gjørdist hann føroyameistari í einstaklingakappingini í amboðsfimleiki, sum var í ítróttarhøllini í Runavík, umframt at hann vann kappingina í seríðkan, amboðsfinalurnar á gólvinum og í ringunum, og hann gjørdist nummar tvey í amboðsfinaluni í lopi um hest.

Tá ið eg sunnudagin eftir kappingina spurdi hann, hvussu nógv heiðursmerki hann hevði vunnið um vikuskiftið, hevði hann mist talið. – Eg giti eini fimm, flenti hann, og so leyp hann avstað aftur út á fimleikagólvið at spæla við hinar fimleikararnar, sum eisini nýttu at sleppa at leypa eina løtu, uttan trýstið frá dómarum og áskoðarum.

Hetta vikuskiftið hevur verið heilt serligt hjá Julian, tí umframt at vinna føroyameistaraskapin í amboðsfimleiki og fleiri heiðursmerki afturat, fekk hann óivað fleiri gávur. –Hann hevði eisini sín fyrsta runda føðingardag sunnudagin, so allir dreingirnir hjá Støkk vórðu bodnir í føðingardag eftir kappingina.